# Fimm ár á Guantánamo



**Hósdagin 11. januar 2007 eru fimm ár liðin síðani Guantánamo-fangalegan á Kuba varð tikin í brúk. Amnesty heitir í hesum sambandi á fólk um at senda heilsanir til fangarnar, sum kunnu birta nýggja vón og eisini gera myndugleikarnar varugar við, at áhugi er fyri fangunum og fyri at mannarættindi verða vird**

AMNESTY
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Síðani 2002 hava tilsamans 775 fangar verið afturhildnir á Guantánamo. Í løtuni sita umleið 430 fangar úr 35 ymiskum londum í fangaleguni uttan ákæru ella dóm.

Amnesty International arbeiðir fyri at fangarnir á Guantánamo verða settir fyri ein vanligan dómstól samsvarandi øllum altjóða standardum, uttan at deyðadómur verður nýttur.

– Um hetta ikki verður gjørt eiga teir at verða leyslatnir beinanvegin, sigur Amnesty.

Tí heitir Amnesty á fólk um at senda nýggjársheilsanir til fangarnar. Heilsanirnar kunnu birta nýggja vón og eisini gera myndugleikarnar varugar við, at áhugi er fyri fangunum og fyri at mannarættindi verða vird – eisini á Guantánamo.

Fimm fangar hava fingið loyvi at fáa post uttanífrá og Amnesty heitir í hesum sambandi á fólk um at senda stuðulsheilsanir til fangarnar.

– Heilsanirnar kunna birta nýggja vón í einari svárari tíð og somuleiðis gera myndugleikarnar varugar við altjóða áhugan fyri fangunum, sigur felagsskapurin.

Menninir, hvørs søga verður søgd á heimasíðuni hjá Amnesty og prentað her í blaðnum í vikuni, hava brúk fyri tínum stuðli. Amnesty heitir á fólk um at senda teimum eina heilsu – eina áminning um, at teir ikki eru gloymdir.

Vit endurgeva her søguna um Bisher al-Rawi, sum stendur at lesa á www.amnesty.fo

# Bisher al-Rawi



**Klivi hansara er brennandi heitur um dagin og ísakaldur um náttina. Teppið er tikið frá honum umframt aðrar lutir sum wc-pappír, tannbust og annað**

Bisher al-Rawi er 34 ára gamal. Hann er irakiskur ríkisborgari, búsitandi í Onglandi.

Í 2002 skuldi Bisher á tænastuferð til Gambia, men enska fregnartænastan steðgaði honum á Gatwick flogvøllinum. Hann varð tó leyslatin í fyrstu atløgu og fór víðari, men varð handtikin aftur í Gambia.

Í byrjanin varð hann hildin aftur á Bagram, Afganistan, og í mars 2003 varð hann fluttur á Guantánamo-fangaleguna.

Bisher er avhoyrdur regluliga og avhoyringarnar hava í høvuðsheitum snúð seg um sambandið millum hann og Abu Qatada, sum CIA hevur undir ilgruna fyri at fremja yvirgang.

Somuleiðis hevur hann verið skuldsettur fyri, at hava havt lutir til hópoyðingarvápn við til Gambia. Seinni er tað komið fram, at “hópoyðingarvápnini” talan var um var ein battaríuppløðara.

Bisher verður enn spurdur somu spurningar sum í 2002 og sýtir nú fyri at samstarva. Hetta hevur við sær at hann verður píndur. Klivi hansara er brennandi heitur um dagin og ísakaldur um náttina. Teppið er tikið frá honum umframt aðrar lutir sum wc-pappír, tannbust og annað. Ensku myndugleikarnir hava ikki vilja hjálpt Bisher, tí hann er irakiskur ríkisborgari. Men í apríl í fjør byrjaðu myndugleikarnir at arbeiða fyri at fáa Bisher aftur til Stórabretland. Hetta er ikki eydnast enn.

Ber ótta fyri, at Bisher verður sendur til Irak, har hann er í vanda fyri at verða píndur og fongslaður uttan eitt rættvíst sakarmál. Tí heitir Amnesty á fólk, um at skriva eina heilsan til Bisher.

***Ynskir tú at senda Omar Deghayes eina heilsan, so er adressan henda:***

**Bisher al-Rawi;**
**ISN 906Camp Delta**
**PO Box 160**
**WashingtonDC 20053**
**USA**

**Týdningarmikið at hava í huga, tá kort verða send:**

- Send einfaldar heilsanir, helst á upprunamálinum ella á enskum.
- Send ikki politiskar ella átrúnaðarligar heilsanir – einfaldar heilsanir, sum bera boð um samkenslu eru nóg mikið.
- Send kort uttan trúarligar ella jólaligar myndir.
- Nýt ikki Amnesty kort og nevn ikki Amnesty International.
- Bið ikki um aftursvar, men skriva navn og bústað á postkortið. So kann viðkomandi avgera um hann svarar tínum brævi.
- Merk brævbjálvan ”Airmail” og set eitt 10 kr. frímerki á.
- Seinasta freist at senda kort er 28. februar 2007.

Vinarliga send Amnesty eitt avrit, um tú fært nakað svar.